# Ráðharri í øðini

Týski fíggjarmálaráðharrin, Peer Steinbrück, er í øðini, eftir at tað er komið fram, at stjórin í einum almennum banka hevur fingið 22 milliónir krónur í eykasamsýning, samstundis sum bankin mátti fáa pengar úr ríkiskassanum fyri at sleppa undan húsagangi. Týsku fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burturúr, at stjórin í HSH-bankanum fekk 22 milliónir krónur í eykasamsýning, samstundis sum bankin mátti fáa meiri enn 22 milliardir krónur í almennari hjálp fyri at sleppa ígjøgnum fíggjarkreppuna. Peer Steinbrück sigur við týsku tíðindastovuna DPA, at eitt mál sum hetta kann fáa sinnið hansara í kók.



# Kina gongur ímóti kreppuni

Tann búskaparligi vøksturin í Kina er so stórur, at greinarar vænta, at Kina verður tað fyrsta stóra landið, sum sleppur burtur úr altjóða kreppuni. Í apríl ársfjórðingi var tann kinesiski búskaparvøksturin 7,9 prosent samanborið við sama ársfjórðing í fjør. Fyrsta ársfjórðing var vøksturin 6,1 prosent. Greinararnir siga, at meðan tey flestu londini hava afturgongd í búskapinum, gongur tað tann øvugta vegin í Kina. Teir halda, at vøksturin í Kina kemst serliga av einum vakstrarpakka, sum stjórnin kom við, og sum hevur økt eftirspurningin á heimamarknaðinum. Harafturímóti hevur tann kinesiski útflutningurin framvegis trupulleikar.

# Aftur ein russisk tíðinda- og mannarættindastríðskvinna myrd

**Russiska tíðindakvinnan og mannarættindastríðskvinnan Natalja Estemirova bleiv 50. Í gjár bleiv hon burturflutt í kekenska høvuðsstaðnum Groznyj, og seinnapartin varð líkið av henni funnið í grannalýðveldinum Ingosjetia. Burturflytararnir høvdu skotið hana tvær ferðir í høvdið**



*Natalja Estemirovavar hevði avdúkað fleiri brot á mannarættindini í Kekenia, og tað kostaði henni lívið*

*Mynd: Reuters*

**DRÁP**

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Russiskmannarættindastríðsfólk leggja kekenska forsetan, Ramzan Kadyrov, undir at hava skipað fyri burturflytingini og drápinum. Tey vilja vera við, at forsetin metti tíðindakvinnuna sum sín persónliga fígginda.

– Ramzan Kadyrov hevði hótt Natalja fyrr. Hann spilti hana út og roknaði hana sum sín persónliga fígginda, sigur Oleg Orlov, sum er formaður í russiska mannarættindabólkinum Memorial.

Vinfólk hjá Natalja Estemirova hava greitt frá, at fýra menn tóku hana og noyddu hana inn í ein bil í kekenska høvuðsstaðnum gjáramorgunin. Seinni um dagin varð líkið av henni funnið í einum skógi tætt við býin Nazran í grannalýðveldinum Ingosjetia.

### Prógvaði brotsverk

Kekenski forsetin var millum tey fyrstu at gera viðmerkingar til drápið. Talsmaður hansara, Alvi Kerimov, segði við fjølmiðlarnar í gjár, at drápsmenninir vóru eirindaleysir brotsmenn, og hann bað løgregluna finna teir seku, so teir kunnu revsast. Kadyrov, sum fær stuðul frá russisku leiðsluni í Kreml, legði afturat, at hann fer sjálvur at fylgja við kanningunum í málinum.



*Á heysti í 2006 varð blað- og mannarættindastríðskvinnan Anna Politkovskaja myrd í Moskva. Eisini hon hevði avdúkað ræðuleikar í Kekenia*

*Mynd: AP*

Men formaðurin í Memorial tekur ikki orðini hjá kekenska forsetanum fyri fult. Tvørturímóti er hann líka sannførdur um, at forsetin hevur sjálvur ábyrgdina av illgerðini.

- Eg eri ikki í iva um, hvør hevur ábyrgdina av hesum. Tann maðurin eitur Ramzan Kadyrov, skrivaði Oleg Orlov í einari fráboðan á heimasíðuni hjá Memorial í gjárkvøldið.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur, at tað er nógv, sum bendi á, at teir kekensku myndugleikarnir góvu boð um, at Natalja Estemirova skuldi beinast av vegnum.

- Hon prógvaði, at teir kekensku trygdarmyndugleikarnir høvdu brotið mannarættindini í fleiri førum, og vit hava góða grund til at halda, at teir kekensku myndugleikarnir skipaðu fyri morðinum, sigurTanja Loksjina, sum arbeiðir fyri Human Rights Watch í Russlandi, við NTB.

### ES og USA fordøma

Russisku myndugleikarnir hava ikki gjørt nakra beinleiðis viðmerking til, at tann kenda tíðinda- og man narættindastríáðskvinnan er myrd. Men talskvinnan hjá russiska forsetanum, Dmitrij Medvedev, segði í gjár, at forsetin varð í øðini, tá hann frætti um morðið, og at hann hevði givið boð um, at málið skal kannast til botns.

ES og USA hava fordømt morðið. Svenski uttanríkisráðharrin, Carl Bildt, sum er formaður í ES í løtuni, sigur, at samveldið fordømir morðið.

- Vit fordøma hesa illgerðina og mæla myndugleikunum til at fáa staðfest, hvør hevur ábyrgdina av hesum, og at seta neyðug tiltøk í verk, segði Carl Bildt.

Amerikonsku myndugleikarnir hava eisini gjø'rt vart við seg, síðani tíðindini um morðið bórust.

- Vit heita á russisku stjórnina um at revsa teir tey, sum framdu hetta grova brotsverkið stóð í einari fráboðan frá Hvítu Húsunum.

### Djørv stríðskvinna

Norðmaðurin Ivar Amundsen, sum er leiðari á Chechnya Peace Forum í London, kendi Natalja Estemirova væl, og hann er skelkaður av, at hon skuldi fáa eina so ræðuliga lagnu.

- Hon var erin sera djørv stríðskvinna. Tey, sum arbeiða fyri mannarættindum í hasum økinum, mugu ansa sera væl eftir, hvat tey siga og gera, men hon lat seg ikki ræða, sigur Ivar Amundsen við NTB.

Sjálvur hitti hann Natalja fleiri ferðir á fundum og ráðstevnum um mannarættindini í Russlandi, og eftir hansara tykki er morðið enn eitt prógv um, at russisk mannarættindastríðsfólk eru í støðugum lívsvanda.

- Tað, sum hendi Natalja Estemirova, kann henda øllum. Tey, sum tora at trína fram og at siga sína hugsan, seta seg í stóran váða. Tey seinnu árini hava vit sæð fleiri politisk morð, ikki bara í Russlandi, men eisini í londum sum Eysturríki, Turkalandi og Dubai, sigur Ivar Amundsen við norsku tíðindastovuna.

### Kendi Politkovskaja

Natalja Estemirova var bæði mannarættindastríðsk vinna og tíðindakvinna. Honarbeiddi fyri mannarættindafelagsskapin Memorial og bólkin RAWarWAR, ið er ein stytting fyri Reach All Women in War. Frá hesum felagsskapinum fekk hon The Anna Politkovskaja Award, ein virðisløn, sum er ognað russiski blað- og mannarættindastríðskvinnu ni Anna Politkovskaja, ið bleiv myrd í Moskva á heysti í 2006.

Natalja Estemirova og Anna Politkovskaja kendust væl, og tær arbeiddu javnan saman í Kekenia. Hóast Natalja Estemirova var russisk, dugdi hon kekenska málið ræðið, og hon var ofta tulkur hjá Anna Politkovskaja í Kekenia.

*(Keldur: NTB og Aftenposten)*

**Kampingvognur**

**til leigu á kampingøkinum á Selatrað.**

**Tlf. 218195**

Eysturkommuna

**Summarfrí**

**20. juli -7 august**

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd í viku 30, 31 og 32.

Opið verður aftur 10. august sum vanligt.

Um átrokandi ørindi eru í hesum tíðarskeiði ber til at ringja á tlf 730004 gerandisdagar millum 10.00-12.00.